## Valevni samstarva

Í Afghanistan er Hamid Karzai, forseti, sinnaður at samstarva við fyrrverandi uttanríkisráðharran Abdullah Abdullah, sum stillaði upp ímóti Karzai á forsetavalinum tann 20. august. Tað endaliga úrslitið av valinum er ikki komið enn, og myndugleikarnir eru lagdir undior grovt valsvik. Tað hevur elvt til iva og misnøgd millum afghanar, men nú ætla tey bæði valevnini at gera eina roynd at loysa kreppuna, skrivar franska tíðindastovan AFP. Samstarvið er komið í lag aftan á trýst frá ES.




## Størsti bankin hall

Tann størsti bankin í USA, Bank of America, hevði eitt nógv verri úrslit í triðja ársfjórðingi, enn marknaðurin hevði væntað. Roknskapurin vísir, at bankin hevði eina milliard dollarar í halli í triðja ársfjórðingi ímóti 1,2 milliard dollarum í avlopi í sama tíðarskeiði í fjør. Bank of America hevur hann stóran inntøkuvøkstur tað seinasta hálvárið, men kortini hevur hann havt hall av rakstrinum. Bloomberg News skrivar, at Bank of America hevur trupulleikar av tveimum fíggingarfeløgum, sum hann yvirtók í sambandi við ta stóru kreppuna á amerikanska fíggjarmarknaðinum.



*Føroyski fiskiflotin er stórur og orkukrevjandi í mun til okkara íbúgvaratal, og tað er serliga her, at Føroya hava lutfalsliga stórt útlát av Co2*

*Mynd: Karstin Vang*

– ella, at Føroyar við einum eykaskjali, sum hon tekur til, stóð undir danska skjalinum.

Júst, hvussu Føroyar skulu síggjast aftur í aljtóða avtaluni, vita vit í løtuni ikki, men tað skal so verða á ein ella annan hátt, leggur hon aftrat.

### Føroyar fremst

Landsstýriskvinnan vísir á, at semjan í Føroyum er kollveltandi á tann hátt, at vit í skjali vilja binda okkum til uppaftur størri skerjingar í útláti enn fleiri onnur lond og felagsskapir av londum.

Hon sigur, at í ES tosa tey um eina sonevnda EGSskipan við kvotum, har ávísur stórídnaður verður tikin burtur úr átøkunum. Hinvegin hava vit ongan stórídnað í Føroyum.

Føroyska átakið merkir, at vit avgjørt liggja í toppinum, tá ræður um skerjing av útláti av veðurlagsgassum, staðfestir landsstýriskvinnan.

Annika Olsen sigur, at hetta mál hevur verið tikið í stórum álvara í Føroyum.

Øll hava verið ógvuliga seriøs og tey, sum hava gjørt viðmerkingar, hava verið ógvuliga positiv um saman at finna eitt føroyskt stev, sum ber á mál. Eg eri ógvuliga fegin um tað arbeiði, sum fylgibólkarnir hava gjørt, bæði fakliga og politiskt, sigur landsstýriskvinnan.



*Nú veit eg ikki, um nakað er broytt í uppskoti landsstýrisins um veðurlagspolitikk, men fyribils havi eg somu viðmerkingar, sum eg áður havi havt, sigur Bogi Hansen, professari í havfrøði, sum í løtuni er staddur uttanlands í arbeiðsørindum*

# Bogi saknar tað ítøkiliga

**Bogi Hansen, professari í havfrøði, er ein teirra, sum hevur gjørt sínar viðmerkingar til uppskot landsstýrisins um skerjing av útláti. Eg sakni, hvussu landsstýrið ítøkiliga ætlar sær at minka um útlátið av veðurlagsgassum, sigur hann**

UMHVØRVI
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Bogi Hansen, professari í havfrøði, er ein teirra, sum hevur sitið í einum fylgibólki, ið hevur gjørt viðmerkingar til uppskot landsstýrisins um veðurlagspolitikk Føroya.

Uppskot landsstýrisins mælir til ein niðurskurð í útláti av veðurlagsgassum við 20% í 2020 í mun til 2005. Hetta svarar á leið til ein niðurskurð upp á 10% í mun til 1990. Hetta er tí ikki serliga ambitiøst í mun til eitt nú ES, sum hevur viðtikið ein niðurskurð, ið er 23 ferðir størri.

### Uppskotið viknar

Havfrøðingurin heldur tó, at hetta er ein framgongd innan føroyskan politikk á økinum, serliga um hetta verður tað fyrsta av fleiri stigum, sum landsstýriskvinnan hevur nevnt.

Bogi Hansen er í sínum viðmerkingum kortini ikki nøgdur við orðingina um, at "Føroyar staðfesta, at politisk støða ikki verður tikin til útlátið av veðurlagsgassum frá oljuframleiðslu ...".

Hann heldur, at henda orðing ger uppskotið hjá landsstýrinum væl veikari, sum hann tekur til.

Havfrøðingurin heftir seg eisini við orðingina hjá landsstýrinum, at "grundsjónarmiðið er, at møguleikarnir fyri at menna eina framtíðar oljuvinnu ikki verða skerdir".

Eg haldi, at her hevði borið væl til at verið blíðari móti umhvørvinum, eitt nú við eini orðing sum "grundsjónarmiðið er, at ein framtíðar oljuvinna í mest møguligan mun avmarkar útlátið av veðurlagsgassum".

Hann heldur, at skuldi ein lønandi oljuvinna víst seg at verið møgulig á føroyskum øki, áttu Føroyar at havt ráð til CO2avmarkandi tiltøk, eins og onnur lond hava gjørt, eitt nú við "carbon sequestration" ella við at keypa CO2kvotur frá øðrum londum.

### Co2 kvotaskipan

Bogi Hansen vísir á, at uppskotið hjá landsstýrinum um virkisætlan er skipað í fýra ymisk øki, og her sigur hann seg ikki hava stórvegis viðmerkingar til tey trý fyrstu teirra.

Tey tykjast sum heild skilagóð og at samsvara yvirskipaða endamálinum. Tað veikasta í virkisætlanini er parturin um skip og flogfør, herundir fiskiflotin. Har eru nógv vøkur orð, men eg dugi ikki at síggja nakað ítøkiligt uppskot, har landsstýri ella løgting kunnu tryggja avmarking í útláti.

Hann heldur, at hesin parturin er so lítið málsøkin, sum hann tekur til, at hann ger alt uppskotið veikari.

Eg mæli tí til, at hesin partur verður tikin úr uppskotinum til veðurlagspolitikk. Í staðin mæli eg til, at landsstýrið fer undir at broyta fiskidagaskipanina til eina CO2kvotuskipan, sigur Bogi Hansen.

### Bogi uttanlands

Tá vit høvdu havfrøðingin í telefonini í morgun, hevði hann í løtuni ikki hug at gera aðrar viðmerkingar til politiska arbeiði um skerjingar av útláti, men vísti til viðmerkingarnar, hann hevur á heimasíðuni vedurlag.fo

Bogi er uttanlands í arbeiðsørindum í løtuni, nú vit kundu fortelja honum, at landsstýriskvinnan í innlendismálum hevði boðað til tíðindafundar í morgun um veðurlagsviðurskifti.

Nú veit eg ikki, um nakað er broytt í uppskoti landsstýrisins, men fyribils vil eg vísa til tær viðmerkingar, eg áður havi gjørt um hesi viðurskifti, sigur Bogi Hansen, professari í havfrøði.